# Í morgin kemur árið hjá Ljómi í hæddina

**Ì annaðkvøld hevur Kirkjukórið Ljómur siðbundnu Allahalgannakonsertina í Vágs Kirkju**

KONSERT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Vágs Kirkja er karmurin um Allahalgannakonsertina, sum Ljómur heldur á hvørjum ári. Hetta er ein konsert, sum ber brá av sorgblíðni og tøkk*

Heilt síðani Kirkjukórið Ljómur varð stovnað í 1939, hevur tað at kalla hvørjum ári havt eina konsert um tað mundi, allahalgannadagur er.

Allahalgannadagur er 1. november og í ár verður konsertin á gudstænastu í annaðkvøld, sunnukvøldið klokkan 18.00.

Hendan løtan í Vágs Kirkju, tá ið korið hevur allahalgannakonsert, er árið hjá Ljómið komið í hæddina, tí hetta er løtan, tá ið tikið verður samanum árið, ið fór.

Ella sum tey sjálvi, so sveimandi siga:

– Dagurin er styttur og alt úr bø og haga er komið til høldar. Flytifuglurin er farin í heitari lond, soleiðis ber løtan brá av sorgblíðni og tøkk.

## Ymiskt á skránni

Á konsertini hesuferð fara tey at syngja "Beati Mortui" eftir F. Mendelsshon – Bartoldi. Tey fara eisini at syngja "So friðarlig er grøvin" eftir Christopher Tye, sum Vilhelm Meyer hevur týtt til føroyskt. Aðrir sangir eru "If ye Love me" eftir Thomas Talls og "Meine Seel ist stille zu Gott" eftir Moritz Hauptmann. Harumframt verður onkur føroyskur sálmur eisini á skránni. Á Gudstænastuni fer nýggi vágsprestur, Patric de Neergaard, at lesa dagsins tekst. Tað verður eisini felagssálmar og tá verður tað Niels Nolsøe, sum spælir undir upp á tað gomlu urguna.

## Nú hvítna tindar

Ikki skerst burtur, at sálmurin, "Nú hvítna tindar" hevur ein serligan týdning fyri Kirkjukórið Ljóm.

Og ímeðan offrað verður, fer Kórið at syngja hendan sálmin hjá Grundtvig.

Tað var einaferð fyrst í fýratiárunum, at Edith Dahl heitti á Robert Joensen um at týða sálmin "Nu falmer skoven trint om land" til føroyskt. Hegnisliga umskrivaði hann sálmin til okkara viðurskifti, og fáur vildi trúð, at hann ikki var upprunaliga føroyskur.

Hesin sálmurin varð stutt eftir sungin á fyrsta sinni í Vágs kirkju til offurguðstænastuna, og tað hevur hann verið síðani og nú er tað meiri enn seksti ár síðani.

## Sjáldsama gott samstarv

Hesi seinastu árini hevur Dorte Tilma úr Århus verið kórleiðari hjá Ljómi. Hon er organistur í Langenæs kirkjuni í Århus. Ljómur fekk samband við hana, og eitt vikuskifti um mánaðin ferðast hon trúliga til Føroya at venja Ljóm og tá verður vant alt vikuskiftið. Ljómur sigur, at kórleiðaranum dámar væl í Føroyum og samstarvið er sjáldsama gott.

Koyring við gróti í Trongisvági:

# Ongin orsøk at stúra fyri okkum

**– Veruleikin er, at persónbilarnir eru til størri vanda fyri ferðsluna enn vit, sum koyra lastbil, sigur Mortan Sørensen, talsmaður hjá teimum, sum koyra grót til nýggju ferjuleguna í Trongisvági**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Lastbilarnir, sum koyra grót til ferjuleguna í Trongisvági, eru ikki til vanda fyri trygdina, tí vit kenna okkara ábyrgd, sigur Mortan Sørensen, sum sjálvir koyrir hendan bilin*

– Vit vísa størstu ábyrgd, tá ið vit koyra lastbil.

Tað sigur Mortan Sørensen í Øravík.

Hann er ein av teimum sjey bilførarunum, sum koyra grót úr grótbrotinum Inni í Líð í Trongisvági, út til nýggju samferðsluhavnina uttanfyri Drelnes.

Hann er eisini talsmaður hjá teimum sum koyra. Og hann er ikki samdur við teimum, sum nú føla seg ótrygg av teirri koyring, sum nú er um dagarnar við gróti úr grótbrotinum, yvir á ferjuleguna.

Ein, sum følir seg ótryggan, er skúlastjórin á Tvøroyri, sum hevur skrivað kommununi bræv, hann hann sigur, at eftir hansara tykki er skúlavegurin hjá børnunum vorðin lívshættisligur, tí tað kemur fyri, at grót dettur út biliunum, á vegin. Og tað heldur hann, at skaði kann standast av, tí lastbilarnir koyra beint eftir skúlavegnum hjá nógvum av børnunum, sum ganga í skúla í Trongísvági.

Fýlst hevur eisini verið á, at lastbilarnir koyra ov skjótt.

## Innanfyri lógarinnar mark

Men Mortan Sørensen heldur ikki, at tað er nøkur orsøk til at stúra fyri koyringini. Tað er heldur ongin orsøk til at føla seg ótrygg fyri teimum lastbilum, sum koyra.

– Vit taka koyringina i største álvara og vit vísa so stóra ábyrgd fyri koyringini, sum vit eiga, sigur hann.

Hann sigur, at lastbilarnir halda seg eisini væl og virðiliga innanfyri lógarinnar mark, bæði, hvat ferð viðvíkur og hvat grótinum í lastini viðvíkur.

Hann viðgongur tó, at í fyrstuni, tá ið koyringin byrjaði, vóru ymsir trupulleikar.

– Onkur hevði kanska hug at koyra nakað skjótt og tað kom eisini fyri, at tann, sum fylti í, hevði lyndi til at koyra nakað nógv í lastina.

Tað førdi í einstøkum føri við sær, at onkur steinur datt á vegin, sigur hann.

Hann sigur, at trupulleikan við ferðini, hava teir, sum koyra, tosa um og ferðin er ikki ein trupuleiki longur. Og trupulleikan við at ov nógv verður fylt í lastina, hava teir tosað við byggifelagið um og tann trupulleikin er eisini loystur í sátt og semju við byggifelagið, so nú er ikki meir í lastini, enn loyvi er til at hava.

– Vit fáa vist fyri hvørt kubikk, so tað er onki endamál hjá okkum at koyra meiri í lastina, enn vit hava loyvi til, tí so missa vit pening.

Mortan Sørensen leggur afturat, at lastbilarnir koyra ikki eftir skúlavegnum hjá børnunum.

– Børnini hava gongutunnil undir landsvegnum at ganga ígjøgnum og tí koma tey ikki í samband við koyringina.

Hann vísur eisini aftur páhaldinum um, at tað er komið fyri, at steinar eru dotnir av lastbilunum, beint við tunnilsmunnarnar, tí tað passar ikki, sigur hann

## Persónbilar størri vandi

Mortan Sørensen sigur, at í veruleikanum er personbilarnir nógv størri vandi fyri ferðslutrygdina enn lastbilarnir eru.

– Tað kemur alt ov ofta fyri, at persónbilar, sum koma av Tvøroyri, inn á Landsvegin við Shellstøðina, ikki halda av, hóast hávatenn eru í vegnum og tað elvir lastbilunum til stórar trupulleikar.

Tað er eisini vanligt, at persónbilar, sum koma inneftir ikki halda av, sum teir skulu og tað elvir eisini til stórar trupulleikar.

Talsmaðurin hjá lastbilførarunum staðfestir, at skelti eru sett upp sum siga, at bilar, sum kora inneftir, skulu halda av fyri bilum, sum koma heimeftir, men tað er heilt vanligt, at tann víkiskyldan ikki verður hildin.

– Tað tænir teimum, sum koyra lastbil til rós, at ongin skaði er hendur, tí ein fullfermdur lastbilur er ikki lættur at steðga. Men at ongin skaði er hendur, er besta prógvið um, hvussu hampiliga lastbilarnir koyra, sigur Mortan Sørensen.

Hann sigur, at einaferð er tað hent, at ein spegil á einum persónbili fór, men tað var tí, at persónbilurin trokaði seg fram, táið hann kom inneftir og sostatt ikki helt av, sum hann átti.

Nú ætlar Tvøroyrar Býráð at heita á Landsverkfrøðingin um at seta ferðina á strekkinum niður á 30 km/t.

– Tað ger ikki mun hjá okkum, sigur Mortan Sørensen



# Vil hava at vita um politikarar kunnu gjara út sum teir vilja

**Katrin Dahl Jakobsen vil hava at vita, um nakrar reglar eru fyri, hvussu politikarar stuðla ymsum tiltøkum**

ALMENNUR STUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tá ið vit fara í lumman hjá skattgjaldarunum, eiga vit at skjalprógva og grundgeva væl og virðiliga fyri hvørjari krónu, sum vit brúka, sigur Katrin Dahl Jakobsen. Tí vil hon hava eina frágreiðing frá Høgna Hoydal um stuðul, hann hevur latið til ein film*

– Kunnu politikarar lata pening til ymisk endamál, sum teir vilja?

Tað vil Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, nú hava at vita.

Tí hevur hon nú sett Høgna Hoydal, landsstýrismanni, nakrar fyrispurningar í tinginum um, hvussu politikarar brúka skattaborgarans pening.

Sum dømi nevnir hon filmin, Færøerne.dk, ið er ein filmur um samráðingarnar ímillum Føroyar og Danmark um fullveldi.

Hesin filmurin fekk stuðul úr sjálvsstýrisfyrisitingini undir løgmansskrivstovuni hjá Landsstýrinum og tað heldur Katrin Dahl Jakobsen, krevur eina nærri frágreiðing.

Hon vil hava at vita, hvussu ein umsting undir Landsstýrinum stuðlar einum filmi, sum annars ikki hoyrir undir økið hjá hesi umsiting.

Í fyrstu atløgu vil hon hava at vita, hvussu stórur stuðulin frá sjálvstýrisfyrisitingini var.

Hon vil eisini hava at vita, hvør gjørdi av, at filmurin skuldi fáa stuðul og av hvørjari kontu stuðulin er latin og eftir hvørjum reglum í hesi kontu, stuðulin varð latin. Samstundis vil hon hava at vita, um hendan kontan fevnir um annan listarligan ella mentanarligan stuðul.

## Eiga at ansa sæl eftir

Hon vil eisini hava at vita, hvussu umsóknin varð viðgjørd, hvørjum fortreytum slíkar umsóknir verða viðgjørdar eftir, áðrenn avgerð verður tikin um, antin stuðul skal latast ella havnast.

Hon vil eisini hava at vita frá Høgna Hoydal, um tað nakrastaðni er lýst, at tað bar til at søkja um stuðul úr sjálvstýrisfyrisitingini til film.

Katrin Dahl Jakobsen heldur, at tað er munur á, um eitt tiltak ella eitt mentanarligt verk verður stuðlað úr privatum lummum, ella um stuðulin fer úr okkara felags kassa.

– Politikarar eiga ikki at leggja seg út í, hvat privat feløg stuðla. Men er talan um almennan pening, eiga vit at bæði at skjalprógva og grundgeva væl og virðiliga fyri hvørjari krónu hjá skattaborgaranum, sum verður latin og eftir hvørjum reglum, fortreytum stuðulin er veittur.

– Eru hesi viðurskifti ikki greið, eigur peningur ikki at verða latin.

Hon nevnir, at Mentanargrunnurin hevur greiða endamálsorðing og samsvarandi kunngerð, sum sigur, hvør ger av, um stuðul skal latast.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at vit eru farin meira og meira burtur frá, at landsstýrisfólk hava kontur, sum tey sjálvi ráða yvir og kunnu gjara út av, sum tey vilja.

Hon heldur eisini, at tað er stórur munur á, at ein umsiting stuðlar einum tiltaki, sum reint fakliga kann metast at hava áhuga hjá vikomandi umsiting.

Men hon heldur, at tað er løgið, at sjálvstýrisfyrisitingin stuðlar einum tiltaki, sum má metast at koma undir heiti mentan og list.

– Tá ið farið verður eftir pengum frá borgaranum, eiga saklig atlit at verða tikin, samstundis, sum vit mugu tryggja okkum, at øll eru líka fyri lógini.

## Ikki nøgd

Høgni Hoydal hevur annars áður í Dimmalætting sagt, at stuðulin til filmin var eftir bókini og at hann átti at fingið enn meiri í stuðuli, enn hann fekk.

So vítt Høgni Hoydal minnist, fekk filmurin 200.000 krónur í stuðuli, sum vórðu tiknar av eini upplýsingarpulju, haðani arbeiðið við Hvítubók eisini varð fíggjað.

Men Katrin Dahl Jakobsen heldur ikki at hetta er nøktandi og vil hava at landsstýrismannin at útgreinað málið beinleiðis fyri Løgtinginum.

Tá ið móttøkan gerst ein tænasta

Optimeraðar arbeiðsgongdir

Lægri kostnaðir

Siemens HiPath telefonskipanin er roknað til allar støddir av virkjum og stovnum, og koyrir yvir vanligt telefonnet umframt kt-net.

Saman við Totalview ritbúnaðinum fæst ein smidlig loysn, sum lyftir telefonskipanina inn í kt-umhvørvið.

Vilja tygum hava fleiri upplýsingar, vinarligast ringið á telefon 344000 ella send ein teldupost til totalview@formula.fo



formula.fo